# ALICE IN CHAINS VIÐ TVEIMUM SANGARUM



Philip Anselmo var oddamaður í Alice In Chains fyri tveimum vikum síðan, men enn er ikki greitt, um hann eisini er tað í summar.

Ein av bestu bólkunum á grungealduni, ið floymdi úr Seattle og um allan heim fyrst í 90'árunum, Alice In Chains er endurstovnaður. Bólkurin fer í summar á konsertferð í Evropa, m.a. spælir hann í Vega í Keypmannahavn 19. juni. Enn er tó ikki greitt, hvør sangari stendur á odda fyri bólkinum á konsertferðini. Upprunaligi sangarin Wayne Staley doyði í 2002. Fyri tveimum vikum síðan luttók endurstovnaði bólkurin í eini heiðursframførslu fyri bólkin Heart í Atlantic City. Hetta var partur av eini sending, ið verður send á VH1 næstum. Tá hevði bólkurin tveir ymiskar sangarar. Fyrrverandi Pantera oddamaðurin Philip Anselmo sang saman við William DuVall, ið er best kendur, sum sangari í solo-verkætlanini hjá Alice In Chains gittarleikaranum Jerry Cantrell. Um tað verður ein av hesum, ella onkur heilt annar, fara vit sjálvandi at kunna tykkum um, so skjótt sum hetta gerst alment.

## WESTLIFE SAMDIR VIÐ JÓANSØKU-FESTIVALINUM

(Mynd: Scanpix)



Íslendski bólkurin Nylon, ið spældi á Jóansøkufestivalinum í fjør, gerst alsamt betur umtóktur. Gentubólkurin er longu eitt stórt navn í Íslandi, men nú sleppa bretar eisini at uppliva fittu poppgenturnar. Írski dreingjabólkurin Westlife er samdur við Jóansøkufestivalinum í, at hetta er ein sera spennandi bólkur. Tí hava teir boðið gentunum at hita upp fyri seg á konsertferðini í summar í Bretlandi. Talan er um 22 konsertir, m.a. eina á nýggju Wembley Arena, sum í hesum døgum verður bygd í London.

## JULIA ROBERTS AFTUR ÚR BARNS-BURÐARFARLOYVI

(Mynd: Scanpix)



Fyrst í 2005 fór Julia Roberts í barnsburðarfarloyvi, fyri at hava betur tíð til tvíburðasynirnar Finn og Hazel. Men nú tykist farloyvið at vera av. Roberts skal sambært tíðaritinum Variety spæla mamma ein autistiskan drong í filminum "Daniel Isn't Talking", filmurin er bygdur á eina skaldsøgu eftir Marti Leimbach, ið eisini skrivaði bókina aftan fyri filmin Dying Young, ið Julia Roberts spældi við í í 1991.

Julia Roberts er enn Pretty Woman í huganum hjá teimum flestu, hon vann ein Oscar fyri leiklutin sum Erin Brockowich í 2001, og var tá hon fór í farloyvi, eitt tað best kenda kvinnuliga navnið í Hollywood.

## STONE OG PARKER Í KRÍGGJ ÍMÓTI SCIENTOLOGY

(Mynd: Scanpix)



Fríggjakvøldið skuldi Comedy Central senda nógv umstrídda partin av South Park tekni-røðini "Out of The Closet", ið ger gjøldur við Scientology. Men hetta bleiv avlýst. Í Hollywood tykist semja at vera um, at Tom Cruise hevur hótt Viacom, ið eigur hansara nýggja film Mission Impossible III og Comedy Central til at taka partin av skránni. Avlýsingin fekk South Park skapararnar Matt Stone og Trey Parker at hótta aftur. Í eini sera Science Fiction kendari avbjóðing, kalla teir stríði fyri eitt milliónára kríggj, skrivar The Independent.

